tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 25.11.2021 kl. 17:40
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 68/21 | 21/00539-1 | Fíggjarætlan -FÆ2022 |
| 69/21 | 21/00460-2 | FSR -umsókn um stuðul til bygging av nýggjum neysti á Hvítanesi |
| 70/21 | 20/00409-3 | TB-Fótboltur umsókn um stuðul og nýtslurætt til Stórá kappingarárið 2021 |
| 71/21 | 21/00637-3 | Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul til skúlaárið 2021/2022 |
| 72/21 | 21/00435-1 | Skjalasavnið -útbygging/víðkan av hølinum 2021 |
| 73/21 | 21/00618-2 | Tvøroyrar Bygda og Sjóvinnusavn -umsókn um stuðul 2021 |
| 74/21 | 21/00597-1 | Spælipláss við Frítíðarskúlan í Trongisvági |
| 75/21 | 21/00390-9 | Arbeiðir á tekniska økinum - Kloakk |
| 76/21 | 21/00694-1 | SEV -Aðalfundur 2021 |
| 77/21 | 21/00693-1 | Eykajáttanir -flyting millum íløgu og rakstrarstøða 2021 |
| 78/21 | 21/00659-1 | Býráðsfundir -Ásetan av fundardøgum í 2022 |
| **Til kunningar** | | |
| | | |

Kristin Michelsen lesur upp skránna og spyr um viðmerkingar eru til hesa.

Súsanna Berholdsen ynskir viðmerkt, at hon ynskir á skrá málið at velja stýrislimir í BHS "Bú og heimatænastuna" av nýggjum, tí Kommunalaeftirlitið hevur ógilda valið av stýrislimum hjá Tvøroyrar kommunu. –Súsanna Bertholdsen kunnar um, at skriv er komið til allar býráðslimir frá Umhvørvis og vinnumálaráðnum, ið ger vart við at kommunustýrislimir hava rætt til at fáa málið á skrá, har kunna verður, at kommunustýrið hevur skyldu til at avgreiða hetta mál.

Kristin Michelsen viðmerkir, at málið at velja stýrislimir í BHS kemur ikki á skrá fyrr en eftirmetingin av eldarasamstravinum er liðugt. At ein arbeiðsbólkurin, er settur at eftirmeta eldraøkið. Kristin Michelsen upplýsir, at málið at velja stýris limir í BHS kemur ikki á skrá fyrr enn eftirmetingin er liðug. Kristin Michelsen upplýsir eisini at Kommunufelagið er partur av eftirmetingini, og kommunalu eldrasamstrøvini verða tikin við í eftirmetingina, har tørvur er á tí. Kristin Michelsen ger vart við at skrivið frá Umhvørvis og vinnumálaráðnum ger vart við, at málið ikki skal men eigur at vera avgreitt.

**Til støðutakan**

## 68/21
## 21/00539-1 Fíggjarætlan -FÆ2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.08.2021 | 46/21 |
| 2 Býráðið | 26.08.2021 | 21/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 47/21 |
| 4 Býráðið | 30.09.2021 | 48/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 84/21 |
| 6 Býráðið | 25.11.2021 | 68/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 22.08.2021)**
Mælt verður til at byrja uppá uppskot til fíggjarætlan 2022 og at fíggjarætlanin verður ætlandi viðgjørd av sum niðanfyri:

- 23. august verður áheitan sent til allar nevndarform/kv. og deildarleiðarar um at byrja uppá fíggjarætlan fyri 2022.

- 30. September, uppskot/kunning til fíggjarætlan "FÆ2022" verður viðgjørd á býráðsfundi 30 september, har ásett verður inntøkumetingar, barnafrádrátt og skattaprosent.

- 28. Oktober, 1. viðgerð verður at leggja fyri býráðið til samtyktar 28. Oktober.

- 25. November, 2. viðgerð, *-fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. Desember-*, verður viðgjørd á býráðsfundinum, sum er lýstur at vera 25. November.

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

- *Samb. løgtingslóg um kommunustýri er ásett í § 39, at fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*
    - *Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.* ***Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.***

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjarætlan fyri 2022

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 26. august 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað. Einmælt samtykt at 2. viðgerðin av fíggjarætlan verður í døgunum 14,15& 16 november.

**Kommunustjórin 10. september 2021:**
Samb. Fráboðan frá TAKS, er skattainntøkur fyri 2022 mettar at blíva: **kr. 64.687.138,-**

**Skattagrundarlag:**

| | | |
|---|---|---|
| A-inntøka: | 350.498.500,- | |
| B-Inntøka: | 17.756.300,- | 368.254.800,- |
| Botnfrádráttur: | | (41.048.398,-) |
| FAS-Inntøka: | (6.456.829,-) | |
| Inntøkufrádr.: | (205.205,-) | |
| Sjófrádr.: | (2.381.026,-) | (9.043.060) |
| **Inntøkugrundarlag:** | | **318.163.342,-** |
| Komm.skatt: (20,9%) | 66.496.138,- | |
| Barnafrádráttur: (398 x 7.000,-) | (2.786.000,-) | |
| Pensionistafrár: (341 x 3.000,-) | (1.023.000,-) | |
| **Netto A-skattur:** | | **62.687.138,-** |
| P/F Skattur: | 2.000.000,- | 2.000.000,- |
| **Mettar inntøkur í alt (2022)** | | **64.687.138,-** |

Borgarstjórin mælir til, at galdandi fyri skattaárið 2022 verður ásett sama skattaprosent og sami barnafrádráttur, ið hevur verði galdandi í skattaárinum 2021.

Tilmælið fyri skattaárið 2022 er, at inntøkugrundarlagið fyri Fíggjarætlanina fyri 2022 verður grunda á:

- Kommunuskattur 20,9%
- Barnafrádráttur kr. 7.000,-

  P/F skattur kr. 2.0 mió.

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Mælt verður til at halda sama skattaprosent og barnafrádrátt galdandi fyri ár 2022, ið var samtyktur í 2021, málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 30. september 2021:**
Einmælt samtykt at áseta skattaprosent galdandi fyri 2022 á 20,9% og barnafrádráttin til kr. 7.000,-

**Kommunustjórin 16. November 2021: (Fíggjarætlan FÆ2022 –seinna viðgerð)**

Á temadagi 15. nov. har allir býráðslimir saman við kommunustjóra, fíggjarleiðara og leiðara av tekniskudeild varð fíggjarætlanin hjá Tvøroyrar kommunu 2022 viðgjørd. Viðgerðin tók støðið í samtyktini á býráðsfundinum 30. September 2021, har karmarnir fyri inntøkumetingar, skattaprosent og frádráttir vóru lagdir sum grundarlag fyri rakstur og íløgur fyri 2022, og í tilfarinum frá stovns- og deildarleiðarum hjá Tvøroyrar kommunu

Nýggjar skattainntøkumetingar eru síðani greinaðar við støði í tølum frá TAKS og Føroya Gjaldsstovu.

| | | | Inntøkugrundarlag | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **2022** | | | 321,9 mió.kr. | | 67,3 mió.kr |
| Barnatal | | 408 | | 7.000 | -2,9 mió.kr |
| Pensionistafrádr. | | 342 | | 3.000 | -1,1 mió.kr |
| | Per.skattur | | | | 63,4 mió.kr |
| | P/F | | | | 2,0 mió.kr |
| | Sakttur í alt | | | | 65,4 mió.kr |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| ***2021*** | | | *316,6 mió.kr* | | *66,2 mió.kr* |
| *Barnatal* | | *398* | | *7.000* | *-2,8 mió.kr* |
| *Pensionistafrádr.* | | *332* | | *3.000* | *-0.996 mió.kr* |
| | *Per.skattur* | | | | *62,4 mió.kr* |
| | *P/F* | | | | *2,0 mió.kr* |
| | *Sakttur í alt* | | | | *64,4 mió.kr* |

Inntøkumetingin §20, FÆ2022 verður sostatt í alt: (Íroknað afturbering eldraøkið og kapitalvinningur)

| | FÆ2021 Rentur + Inntøkur | FÆ2022 Rentur + Inntøkur | | |
|---|---|---|---|---|
| §20 | 825.000 | 850.000 | 25.000 | Rentustuðul |
| | 491.133 | 200.000 | -291.133 | Rentur |
| | -21.717.000 | -22.388.000 | -671.000 | Afturbering eldraøkið |
| | -64.380.082 | -65.400.730 | -1.020.647 | Skattur og avgjøld við 20,9% |
| | -84.780.949 | -86.738.730 | -1.957.780 | |

Samlaðu inntøkurnar verða mettar til 86.7 mió.kr. samanborið við 84.8 mió.kr. í 2021, svarandi til ein vøkstur á 3,21%.

Á temadagnum 15. nov. var full semja um at leggja eitt fíggjarætlanar tilmælið "FÆ2022", til samtyktar fyri Tvøroyrar býráð, við støði í omanfyri nevndu inntøkumeting og niðanfyri nevndum rakstrar og íløguætlanum.

- Skattaprosentið verður óbroytt 20,9%, og barnafrádrátturin verður kr. 7.000,-
- Rakstrarútreiðslur 80,0 mió.kr.
- Íløguætlanir 37,1 mió.kr.

| Rakstrarstøð | FÆ2022 |
|---|---|
| §1 -Kommunal fyrisiting | 10.863.878 |
| §2 -Almanna og heilsumál | 29.669.299 |
| §3 -Børn og ung | 16.431.914 |
| §4 -Utbúgving og gransking | 6.979.920 |
| §5 -Mentan og frítíð | 8.039.350 |
| §6 -Teknsik mál | 5.371.990 |
| §7 -Kommunal virki | 2.691.280 |
| | **80.047.632** |




Mettu samlaðu rakstrarútreiðslurnar á 80.05 mió.kr. svara til ein vøkstur á 3,8% samanborðið við FÆ2021. Størstu hækkingar í rakstrinum stava frá øktum útreiðslum í samband við økt barnatal í ansing í barnagarðinum og øktar útreiðslur til BHS, Bú- og heimatænastuna.

| Fíggjarætlan 2022 | Mió.kr. |
|---|---|
| Inntøkur | 86,7 |
| Rakstrarútrl. | 80,0 |
| Rakst.avlop. | 6,7 |

Samanumtikið vísir fíggjarkarmurin fyri 2022 eitt rakstraravlop á 6,7 mió.kr.

| Íløguætlan 2022 | Mió.kr. |
|---|---|
| §1 -Kommunal fyrisiting | 1,6 |
| §2 -Almanna og heilsumál | 0 |
| §3 -Børn og ung | 2,4 |
| §4 -Utbúgving og gransking | 3,6 |
| §5 -Mentan og frítíð | 0,9 |
| §6 -Teknsik mál | 17,4 |
| §7 -Kommunal virki | 11,2 |
| | 37,1 |




Á frammanfyri standandi talvu eru raðfestar 37,1 mió.kr. í íløgustuðli og íløgum, ið vera fíggjaðar:

- Rakstraravlop, 6,7 mió.kr.
- Lántøku, 24,0 mió.kr.
- Gjaldføri, 9,7 mio.kr
- Fíggjarpostar -3,7 mió.kr. (niðurgjald av skuld)

| Gjaldføri/Fíggjarpostar | 2021 ultimo | 2022 ætlan |
|---|---|---|
| Tøkur peningur d.d. | 13,5 mió.kr | - |
| Goymslur og áogn | 10,6 mió.kr | - |
| Langfreista skuld | 51,4 mió.kr | 72,1 mió.kr. |
| Stuttfreista skuld | 5,3 mió.kr | - |

Soleiðis einmælt tilmælt á temadegi 15. nov. 2021, verður seinna viðgerð av fíggjarætlan FÆ2022 fyri Tvøroyrar kommunu við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið um fíggjarætlan FÆ2022, sum varð viðgjørd á temadegnum 15. nov. 2021. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini hin 18. november. Harvið er fíggjarætlanin FÆ2022 fyri ár 2022 einmælt og endaliga samtykt við seinnu viðgerð.

**69/21**
**21/00460-2 FSR -umsókn um stuðul til bygging av nýggjum neysti á Hvítanesi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 57/21 |
| 2 Býráðið | 28.10.2021 | 55/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 74/21 |
| 4 Býráðið | 25.11.2021 | 69/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 20.05.2021)**
Umsitingin hevur í eina tíð samrátt við nevndina í FSR Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, um bygging av nýggjum kappróðrarneysti á Hvítanesi. Stuðulsavtala er gjørd, sum verður løgd fyri aðalfund í FSR til samtyktar 24. Nov. 2021, og um samtykt á aðalfundi hjá FSR verður henda eftirfylgjandi løgd fyri Tvøroyrar býráð til samtyktar.

Stuðulsavtalan er í 14. punktum. Samlaði byggikostnaðurin er kr. 10.320.000,- ex. mvg. Tvøroyrar kommuna stuðlar við kr. 6.5 mió. ex. mvg. Lokale og Anlægsfonden stuðlar við kr. 3.8 mió.

**Lógargrundarlag: kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Borgarstjórin kunnar um, at aðalfundur hevur verði í FSR 24. okt., og hevur aðalfundurin samtykt stuðulssáttmálan við Tvøroyrar kommunu. Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at býráðið samtykkir stuðulssáttmálan sum fyriliggur. Fíggarnevndin mælir einmælt til, at FSR og Tvøroyrar kommuna áseta ein av fyrst komandi døgum, eftir býráðsfundin 28. nov., har spakin verður ísettur til bygging av nýggjum kappróðrarneysti.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at stuðla FSR samb. fyriliggjandi stuðulssáttmála.

Val av limum í bygginevndina umboðandi Tvøroyrar kommunu.
Alvi Mortensen skjýtur upp at Jónleyg J. Bech og Kristin Michelsen vera fastir limir.
Jónleyg Jespersen Bech skjýtir upp at Alvi Mortensen verður varaumboð fyri Jónleyg Jespersen Bech og at Anita Vibergsdóttir verður varaumboð fyri Kristin Michelsen

Kristina Roest skjýtur upp at Bjarni Hammer verður fastur limur. Súsanna Bertholsen skjýtur upp, at vara umboð fyri Bjarna Hammer verður Kristina Roest

**Kommunustjórin 04.11.2021**
Kommunustjórin og fíggjarleiðarin mæla til, -nú stuðulsavtalan millum Tvøroyrar kommunu og Froðbiar Sóknarróðrarfelag FSR er endaliga samtykt og undirskriva av báðum pørtum-, at stuðulsjáttanin, ið er avsett á FÆ2021, §525 á kr. 1.500.000,- verður flutta á depotkonto hjá FSR.

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Einmælt samtykt at stuðulin til FSR verður fluttur á depotkonto hjá FSR

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini frá 18. november 2021

**70/21**
**20/00409-3 TB-Fótboltur umsókn um stuðul og nýtslurætt til Stórá kappingarárið 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 28.01.2021 | 5/21 |
| 2 Mentanarnevndin | 02.02.2021 | 8/21 |
| 3 Mentanarnevndin | 02.03.2021 | 10/21 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.03.2021 | 14/21 |
| 5 Býráðið | 25.03.2021 | 18/21 |
| 6 Mentanarnevndin | 14.10.2021 | 89/21 |
| 7 Býráðið | 28.10.2021 | 65/21 |
| 8 Býráðið | 25.11.2021 | 70/21 |

Málslýsing:

**Kommunustjórin 05.12.2020**
Til viðgerðar er umsókn um stuðul, sum umsitingin hevur móttikið frá TB fótbóltur til virksemið hjá felagnum komandi ár.

**Mentanarnevndin 8. desember 2020 kl. 13:00 Avgerð**
Einmælt samtykt at málið verður viðgjørt á býráðsfundi, har umboð fyri nevndina í TB vera boðin á luttaka og greiða frá ætlanunum fyri komandi kappingarár.

**Býráðið 28. januar 2021:**
Kristin Michelsen skjýtur upp, at umsóknin til stuðul til TB, verður beint aftur í Mentanarnevndina.
**Einmælt samtykt.**
Kristin Michelsen skjýtur upp, at TB fær nýtslurættin til felagshúsið og vøllin við Stórá kappingarárið 2021.
**Einmælt samtykt.**

**Mentanarnevndin 02. februar 2021:**
Einmælt samtykt at heita á nevndina í TB um at innsenda roknskap fyri 2020 og fíggjarætlan fyri 2021.

**Mentanarnevndin 02. marts 2021:**
TB fótbóltur søkir um stuðul á kr. 600.000,- fyri kappingarárið 2021. Einmælt samtykt, at stuðla við kr. 400.000,-, har 15% av stuðulsupphæddini, svarandi til kr. 60.000,- verður oyramerkt til ungdómsfótbolt,

og at málið kann vera tikið upp til nýggja viðgerð í august 2021. –Stuðulsjáttanin, sum er útgoldin í 2020, og var ætlað sum stuðul til 2021 verður mótroknað stuðulsupphæddini. –Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**<u>Fíggjarnevndin 18. marts 2021:</u>**
Bjarni Hammer mælir til at stuðla samb. umsókn kr. 600.000,-, har 15% oyramerkt til ungdómsfótbolt. Jónley Bech og Kristin Michelsen mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**<u>Býráðið 25. marts 2021:</u>**

**<u>Uppskot A:</u>** Bjarni Hammer mælir til at stuðla samb. umsókn kr. 600.000,-, har 15% oyramerkt til ungdómsfótbolt.

**<u>Uppskot B:</u>** Jónleyg J. Bech mælir til at TB Fótbóltur fær fíggjarligan stuðul á kr. 400.000,- har 15% av stuðulsupphæddini, svarandi til kr. 60.000,- verður oyramerkt til ungdómsfótbolt, og at málið kann vera tikið upp til nýggja viðgerð aftur.
Stuðulsjáttanin, sum er útgoldin í 2020, og var ætlað sum stuðul til 2021 verður tikið upp til viðgerð á fundi við nevndina í TB. TB fær sostatt stuðul á kr. 400.000,-

Fyri uppskot A: Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest og Bjarni Hammer
Ímóti Uppskot A: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech og Jónhild Nybo
**Harvið er uppskot A fallið**

**Fyri Uppskot B: Einmælt samtykt**

**<u>Kommunustjórin 12. oktober 2021</u>**
TB heitur á Tvøroyrar kommunu um at viðgerða umsóknina um stuðul til kappingaráðið 2021 av nýggjum. Hetta tí at stuðulsupphæddin, ið var játta fyri 2021, var mótrokna við upphæddini, sum av missgávum vóru fluttar ovnógv í stuðul fyri kappingaráðið 2020.

Tvøroyrar býráð hevur játta stuðul til TB (Betrideildin) fyri kappingarárini:

- 2020, kr. 408.000,-, men av missgávum er flutt kr. 524.000,-, tvs. kr. 116.000,- meira enn játta.
- 2021, kr. 340.000,-, og eru tær 116.000,-, ið vóru fluttar fyri 2020 mótroknaðar. Tvs. TVK hevur flutt fyri 2021 kr. 224.000,- á konto hjá TB (Betri deildin)

TB ynskir at stuðulsupphæddin, sum av missgávum var flutt fyri kappingaráðið 2020 ikki verður mótroknað stuðlinum í 2021.

**Fíggjarligar avleiðingar:** Um Tvøroyrar kommuna ynskir játta meira stuðul, verður hetta at fíggja av FÆ2021, 5.24.54 "Stuðul til ítrótt", har avsett eru kr. 800.000,-. (saldo d.d. kr. 664.000,-)

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Mentanarnevndin 14. oktober 2021:</u>**
Einmælt samtykt, at írestandi stuðulsupphæddin á kr. 116.000,-, ið var játta í stuðul til TB (Betrideildin) 2021 verður flutt á konto hjá felagnum. Upphæddin á kr. 116.000,-, sum var goldin ov nógv í stuðul í

2020, verður viðgjørt á fundi við Tvøroyrar býráð á 28. oktober 2021. Umsitingin innkallar nevndina í TB til fundin 28. oktober.

**Kommunustjórin 19.10.2021**
Innbjóðing er sent til nevnd.form. í TB at nevndin fyri felagið møtir til býráðsfundin 28. okt. 2021 at viðgerða stuðulsumsóknina til TB fyri 2020/2021, samt ætlanirnar hjá felagnum fyri komandi kappingarár.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Umboð fyri nevndina hjá TB, Eydis Ellendersen, Hans Olaf Johannesen, Páll Nolsøe, Elvis Hammerfoss Leo vóru møtt á fundi, fyri at greiða frá um gongdina og ætlanir fyri komandi kappingarár.

Einmælt samtykt, at eftirgeva TB stuðulsupphæddina á kr. 116.000,-, sum av misgáum er fluttur sum stuðul til kappingarári 2020.

**Kommunustjórin 17. november 2021:**
Seinna viðgerð av eykajáttan verður hervið samb. kommunustýrislógini §41,stk.2., latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt og endaliga samtykt við seinnu viðgerð.

**71/21**

**21/00637-3 Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul til skúlaárið 2021/2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 09.11.2021 | 98/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 75/21 |
| 3 Býráðið | 25.11.2021 | 71/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 31.10.2021**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá Føroya Eftirskúla til virksemið skúlaárið 2021/2022.

Í Umsóknini verður upplýst at tørvur er á stuðul svanarndi til kr. 400.000,- Peningurin skal nýtast til hølisleigu, ljós og hita kr. 200.000,-, og aðrar kr. 200.000,- til at Føroya Eftirskúli kann halda fram sítt nýskapandi virksemi.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin og Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar.

> *Kapittul 6*
>
> *Figging av rakstri og ílogum*
>
> *§ 17. Virksemið hjá eftirskúlunum verður lutvíst fíggjað við stuðli, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar útvega. irestandi figging skal útvegast við næmingagjaldi og/ella privatum stuðli.*
>
> *Stk. 2. Landskassans partur er:*
>
> *1. Til allar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til lon til skúlaleiðara, lærarar og onnur starvsfólk, ljós og hita, leigu, viðlíkahald, undirvísingartilfar, trygging o.s.fr, verða latín í mesta lagi 70% av kostnaðinum.*
>
> *2. Til keyp av húsum, bygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla verða eftir landsstýrismansins góðkenning sum rentu- og avdráttarfrítt lán latin í mesta lagi 50% av virðinum eftir virðismeting.*

**Fíggjarligar avleiðingar: Ongin játtan er avsett á FÆ2021**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 09. november 2021:**
Pól Arni Holm, skúlastjóri greiddi frá, at tá næmingatalið er komi uppá 25 næmingar ber Føroya Eftirskúli seg uttan stuðul frá Tvøroyrar kommunu. Tilmeldanin til komandi skúla ár er 13 næmingar, og útlitini eru góða fyri at talið veksur við tíðini. Til allar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til løn til skúlaleiðara, lærarar og onnur starvsfólk, ljós og hita, leigu, viðlíkahald, undirvísingartilfar, trygging o.s.fr, verða latín í mesta lagi 70% av kostnaðinum frá landinum landinum.

Einmælt samtykt at játta stuðul til Føroya Eftirskúla á kr. 400.000,- samb. umsókn frá Føroya Eftirskúla. Víst verður til fund við mentamálaráðið 07. juli 2021 við luttøku av landsýrismannin og umboð í mentamálaráðnum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Einmælt samtykt –Játtanin verður fíggja sum eykajáttan av innistandandi –málið verður beint í býráðið til tvinnar viðgerðir

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt við fyrru viðgerð –málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**72/21**
**21/00435-1 Skjalasavnið -útbygging/víðkan av hølinum 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.05.2021 | 6/21 |
| 2 Mentanarnevndin | 20.08.2021 | 48/21 |
| 3 Mentanarnevndin | 14.09.2021 | 62/21 |
| 4 Mentanarnevndin | 14.10.2021 | 90/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 55/21 |
| 6 Býráðið | 28.10.2021 | 54/21 |
| 7 Býráðið | 25.11.2021 | 72/21 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 07.05.2021)**
Forkv. í mentanarnevndini ynskir kunning um gongdina at útbyggja hølini hjá skjalasavninum har avsett eru á FÆ2021 kr. 700.000,- Til hetta verður tekniskileiðarin á fundinum at greiða frá.

**Mentanarnevndin 11. maj 2021:**
Málið verður útsett til næsta fund í mentanarnevndini

**Mentanarnevndin 20. august 2021:**
Málið verður útsett til næsta fund í mentanarnevndini

**Mentanarnevndin 14. september 2021:**
Kári Jespersen, leiðari á skjalasavninum var møttur á fundinum fyri at greið frá um gongdina, nu arbeiði at víðkað og dagføra Skjalasavnið. Kári greiddi frá MTV v/ Mortan Tormann Vang er arbeiðstakari og arbeiði gongur sum ætlað. KJ ger vart við at hæddin millum loft og gólv ikki verður tann, sum hann hevði ynskt, og viðførur hetta at tal av hillum verður minni enn ætlað. KJ er nøgdur við arbeiði, sum verður gjørt, og metur at úrslitið verður nøktandi við plássið til teirra virksemið.

Kári Jespersen greiddi eisini frá um støðuna viðv. -PH18, sum hevur fingið játtan til ístandgering. Nakað av avbjóðing hevur verði við veiting av játtan, men er hetta komið uppá pláss. Játtan kann bert leysgevast við loyvið frá verkætlanarleiðaranum, sum er Kári Jespersen. Arbeiði er byrja, men nakrar avbjóðingar eru viðv. Tjóðsavninum, orsakað av at pakkhúsið er friða. Maifinn Norðoy er arkitektur fyri verkætlanini. Arbeiðstakarar eru Pól f. Joensen, timburarbeiði og VERK í Trongisvági snikkara arbeiði. Arbeiðis skal eftir ætlan vera liðugt 31. desember 2024.

**Kommunustjórin 14. Oktober 2020**

Forkv. í mentanarnevndini, Anita Vibergsdóttir ynskir kunning frá Tekniskudeild um arbeði sum fer fram at víðkað skjalasavnið, nú plásssið ikki er tað sum var ætlað.

Forkv. í mentanarnevndini undrast yvir, hví stórt frávik er millum tað sum bygt er, og tað skitsu og ætlan, sum var gjørd og presentera av TD og samtykt av MN at fremja 9. Mars 2020. Og hvør orsøkin er til, at Tekniskadeild ikki hevur framt útbyggingina samb. egnu skitsu.

Forkv. í mentanarnevndini undrast yvir, og setir sp. við byggiháttin, sum sýnist ikki geva fult nyttuvirði av plássinum, har MN hevið samtykt, at hølisvíðkanin skuldi fremjast samb. samtyktu skitsu hjá TD og geva eyka pláss til 16x5m hillar.

Forkv. í mentanarnevndini ynskir greiðu á, hvørjar málsviðgerðir og samtyktir eru tiknar, sum liggja til grundar fyri, at útbyggingin ikki er framd samb. samtyktina í MN 9. Mars 2020, har tað sum nú er bygt, sýnist vera munandi minni enn lýst á skitsunum hjá TD, sum MN hevur grunda sína samtykt á 9 mars 2020.

Forkv. í mentanarnevndini ynskir greiðu á, hví MN ikki hevur fingið málið aftur til nýggja viðgerð, nú stórar broytingar er framdar frá tí sum er samtykt, og tí sum er bygt. Og at MN ikki er kunna um slíkt tíðandi frávik.

**Mentanarnevndin 14. oktober 2021:**

Málið var umrøtt og kunnað. Einmælt samtykt, at Tekniskileiðarin kannar kostnaðin av, at fýrrúmi verður lagt afturat nýggja goymslurúminum. At oljuketil/fýr verður flutt annað stað í bygninginum, og at rúm hjá vaskifólkinum verður staðsett aðrastaðni í bygninginum. Teknisk leiðarin vendur aftur mánadagin 18. oktober 2021, við kostnaðarmeting.

**Kommunustjórin 20. Oktober 2021:**

Mentanarnevndin mælir til at eykajáttan á kr. 320.000,- verður játta til útbýgging av Skjalasavnið, samb. kostnaðarmeting hjá tekniskaleiðara, soleiðis at arbeiði kann gerðast liðugt í inniverandi ári, og at uppíbyggingingin verður viðkað samb. tilmælið á fundi í mentanarnevndini 14. okt. 2021.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**

Einmælt samtykt, og eykajáttan verður veitt, og fíggingin verður við flytan millum  konti. Málið verður beint býráðið.

**Býráðið 28. oktober 2021:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Kommunustjórin 17. november 2021:**

Seinna viðgerð av eykajáttan verður hervið samb. kommunustýrislógini §41,stk.2., latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 25. november 2021:**

Einmælt og endaliga samtykt við seinnu viðgerð

**73/21**
**21/00618-2 Tvøroyrar Bygda og Sjóvinnusavn -umsókn um stuðul 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 09.11.2021 | 96/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 82/21 |
| 3 Býráðið | 25.11.2021 | 73/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 19. okt. 2021**
Nevndarform. fyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn søkir um at fáa útgoldið stuðulsjáttan til raksturin av savninum.
Tvøroyrar kommuna hevur á Fíggjarætlan fyri ár 2021 játta stuðul á kr. 325.000,- til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn.

Umsitingin hevur grandskoðan roknoskap fyri ári 2020, og mælt verður til at stuðul á kr. 325.000,- verður fluttur á konto hjá Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúðin og Løgtingslóg um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi, sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986

**Fíggjarligar avleiðingar:** Rakstrarkonti §528 Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn útgreina: (Játta í alt FÆ2021 kr. 325.000,-)

**Býti av stuðulsupphædd:**
- Rakstur av bygningum og hølum: kr. 50.000,-
- Lønir til starvsfólk: 175.000,-
- Umvælingar: kr. 100.000,- (Krevur útgreining/skjalprógv fyri umvæling)

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 09. november 2021:**
Einmælt samtykt at stuðla samb. umsókn. –Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Einmælt samtykt –Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt

**74/21**
**21/00597-1 Spælipláss við Frítíðarskúlan í Trongisvági**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 12.10.2021 | 30/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 66/21 |
| 3 Býráðið | 28.10.2021 | 59/21 |
| 4 Býráðið | 25.11.2021 | 74/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 10.10.2021)**
Forkv. í sosialu nevnd, Jónleyg J. Bech ynskir at viðgerða viðurskiftini kring spæliplássið við frítíðarskúlan í Trongisvági, har stovnsleiðarin Kari Petersen hevur gjørt vart við, at økið er slitið og treingir til ábøtur.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018

> *§ 3. Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt og hevur ábyrgdina fyri virkseminum. Dagstovnur sambært hesi lóg er vøggustova, barnagarður, frítíðarheim o.a. Dagrøkt sambært hesi lóg er ansing av børnum í heiminum og á spælistovum.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2021-2022

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 12. oktober 2021:**
Ongin játtan er avsett á FÆ2021 til dagføringar av spæliplássinum við frítíðarskúlan. Mælt verður til at dagføra spæliplássið, og at fígging fæst av rakstraravlopið, har avlop verður mett til 625.000,-. Kari Petersen innheintar tilboð uppá dagføringar. Einmælt samtykt.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggarnevndina eftir at tilboð eru innkomin. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt tilmælið hjá sosialu nevnd. Málið verður beint í býráðið.

**Kommunustjórin 28.10.2021:**
Leiðarin av dagrøktini hevur heitt á 2 veitarar um at innlata tilboð, ið bæði eru innan fyri játtanarkarmin. Mælt verður til at leiðarin av barnagarðinum, saman við starvsfólkum í frítíðarskúlanum fáa heimild til at gera av, hvørt av teimum innkomnu tilboðunum, takast skal av.

Mælt verður til at fíggja hetta av rakstraravlopið til frítíðarskúlan, FÆ2021, §312.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**Kommunustjórin 17. november 2021:**
Seinna viðgerð av eykajáttan verður hervið samb. kommunustýrislógini §41,stk.2., latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt og endaliga samtykt við seinnu viðgerð

**75/21**
**21/00390-9 Arbeiðir á tekniska økinum - Kloakk**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.10.2021 | 57/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 78/21 |
| 3 Býráðið | 25.11.2021 | 75/21 |

**Málslýsing:**
Kloakkarbeiðir er klárur at fara ígongd nú í heyst. Arbeiði talan er um eru:

- Arbeiðstøkusáttmála fyri kloakk í Trongisvági
- Innkomið tilboð fyri kloakk undir Heygnum
- Innkomið tilboð fyri kloakk í Puntabyrgi

Viðheft er útbjóðingartilfar og tekningar, innkomin tilboð og uppskot til sáttmála.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**

**Tekniska nevnd 19. april 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við at seta arbeiði ígongd sambært lista. Terrassa bíðar.

**Málslýsing - Tekniskur leiðari 04-11-2021:**
Vísandi til FÆ21 var settur peningur av til dagføringar av vindeygum í Trongisvágsskúla og skúlanum á Tvøroyri/ (svimjihøll og tónleikastova) inkl. 2 hurðar og ein brand hurð.
Vindeygu eru skifti í Trongisvágsskúla samsvarandi FÆ21 og fara arbeiðini við at skifta og dagføra vindeygu hurðar ígongd á svimjihøllini innan stutta tíð, samsvarandi FÆ21.

**Lógargrundarlag:**
-

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Peningur er settur av til arbeiðini á FÆ21.

**Tilmælið:**
At halda á fram við at dagføra bygningslutir sum hava ávirkan á livitíðina hjá øðrum bygningslutum.

**Tekniska nevnd 08. november 2021:**
Einmælt samtykt at arbeiði verður gjørt og málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 15. oktober 2021:**
Einmælt samtyk at seta arbeiðir við kloakk í verk.

**Tekniskur leiðar 04.11.2021:**
Í samráð við kommunustjóra verður hettar mál vís til býráði umvegis fíggjarnevndina til samtyktar.

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Einmælt samtykt at arbeiði verður sett í gongd.

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tekniskunevnd og fíggjarnevndini

**76/21**
**21/00694-1 SEV -Aðalfundur 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.11.2021 | 76/21 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 22.11.2021
Fundarboð til eykaaðalfundin 26. november 2021 kl. 9:30, Hotel Føroyar

**Lógargrundarlag:** Viðtøkurnar fyri SEV. -Hægsta vald í felagnum hevur aðalfundurin. Á aðalfundi møta limakommunurnar, sum hvør sær hava eina atkvøðu fyri hvørt byrjað 1000 íbúgvaratal. Áðrenn limafundin lata kommunurnar inn fulltrúarváttan, har sagt verður frá, hvør umboðar tær.
https://www.sev.fo/um-okkum/sev-folksins-ogn/vidtokur/

**Fíggjarligar avleiðingar: ongar**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt at Borgarstjórin Kristin Michelsen fær atkvøðurætt á eykaaðalfundinum hjá SEV.

77/21

## 21/00693-1 Eykajáttanir -flyting millum íløgu og rakstrarstøða 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.11.2021 | 77/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjorin 22.11.2021)**
Fíggjardeildin er ikki liðug við uppgerðini av eykajáttan og flytan millum játtanir fyri 2021.

Roknskapurin fyri 2021 framroknað vísir avlop á kr. 11,0 mió. fyri rakstur og íløgur.

Meirnýtsla er tó á nøkrum greinum innan:

| | |
|---|---|
| o §1 Kommunalafyrisitingin | kr. 1,7 mió. |
| o §2 Almanna og heilsumál | kr. -0,5 mió. |
| o §3 Børn og ung | kr. 4,5 mió. |
| o §4 Undirvísing | kr. 1,8 mió. |
| o §5 Mentan og frítið | kr. 0,1 mió. |
| o §6 Teknisk mál | kr. -1,4 mió. |
| o §7 Umhvørvi | kr. 4,5 mió. |
| Samla: (Avlop) | kr. 11,0 mió |

Mælt verður til at fíggja meirnýtsluna við flytingum innan hvørja grein sær ella av innistandandi.

**Lógargrundarlag: Kommunustýrislógin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2021 -flytan millum íløgu og rakstarjáttanir

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt við fyrru viðgerð –málið skal hava tvinnar viðgerðir

**78/21**

**21/00659-1 Býráðsfundir -Ásetan av fundardøgum í 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.11.2021 | 78/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 09.11.2021**
Mælt verður til at hava býráðsfundir samb. niðanfyri skrá.

| Jan. | Feb. | Mar. | Apr. | Mai | Jun |
|---|---|---|---|---|---|
| Tór. 27 | Tór. 24 | Tór. 31 | Tór. 28 | Týs. 31 | Tór. 30 |

| Jul. | Aug. | Sep. | Okt. | Nov. | Des. |
|---|---|---|---|---|---|
| ongin | Óns. 31 | Tór. 29 | Tór. 27 | Tór. 24 | Tór. 22 |

# Býráðsfundir

Býráðsfundir eru vanliga eina ferð um mánaðin, -seinasta Tórsdag í hvørjum mánaði-. Allir býráðsfundir vera hildnir á Kommunuskrivstovuni, á Tvøravegi 37, í býráðssalinum kl. 17.00.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á býráðsfundi, mega verða býráðnum í hendi í seinasta lagi hin 5 dagin í mánaðinum, sum býráðsfundurin er.

Umframt regluligu býráðsfundirnar kann býráðið halda eykafundir, tá ið støða skal verða tikin til týdningarmikil mál, sum hava skund.

juli og ½ august heldur býráðið summarfrí.

# Fíggjarnevndin

Fíggjarnevndin hevur vanliga fund, tórsdag vikuna fyri sum býráðsfundur er.
Mál, ið ynskjast viðgjørd í Fíggjarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5 dagin í mánaðinum, sum fíggjarnevndarfundur er.

# Sosialanevnd

Sosialanevndin hevur vanliga fund, týsdag vikuna fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Sosialunevnd, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum sosiala nevnd hevur fund.

# Mentanarnevndin

Mentanarnevndin hevur vanliga fund, týsdag vikuna fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Mentanarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum mentanarnevndin hevur fundur.

# Tekniska nevnd

Tekniska nevnd hevur vanliga fund, mánadag vikuna fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Teknisku nevnd, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum tekniskanevnd hevur fund.

# Trivnaðar- og umhvørvisnevndin

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin hevur vanliga fund, týsdag vikuna fyri sum fíggjarnevndar fundur er.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Trivnar- og umhvørvisnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum Trivnar- og umhvørvisnevndini hevur fund.

## Vinnu- og havnanevndin

Vinnu- og havnanevndin hevur vanliga fund, hvønn mánadag vikuna fyri sum fíggjarnevndar fundur er.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Vinnu- og havnarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum, sum Vinnu- og havnarnevndin hevur fund.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018 (Kommunustýrislógin) Kapittul 3

*Kommunustýrisfundir*

*§ 13. Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. Nærri reglur um vanligar fundir skulu vera ásettar í fundarskipanini. Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.*
*Stk. 2. Kommunustýrið hevur eykafund, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av kommunustýrislimunum krevja tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundir verða hildnir. Avgerð um eykafund skal verða almannakunngjørd, um høvi er til tess.*

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**<u>Býráðið 25. november 2021:</u>**
Einmælt samtykt

Til kunningar

**33/21**

**21/00611-4 Skjalasavnið -fundur við fyrisiting hjá Mentamálaráðnum 2021 um skipan av skjalasavninum framyvir**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 09.11.2021 | 12/21 |
| 2 Býráðið | 25.11.2021 | 33/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 02.11.2021**
Mentamálaráðið og umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu, starvsfólkini á Tvøroyrar skjalasavni, form. fyri Tvøroyrar bygda- og sjóvinnusavni, borgarstjórin, samt forkv. í mentanarnevndini møttist til fund í SALT hin 25. Okt. 2021, viðgerða Tvøroyrar skjalasavn, nú royndartíðin er enda.

Mentamálaráðið hevur sett á skrá evnið at viðgerða, hvussu vit best fáa lagt Tvøroyrar skjalasavn undir bygdasavnslógina, har skjalasavnið møguliga verður skipað sum sjálvstøðug deild á Tvøroyrar bygdasavni við oyramerktari játtan á fíggjarlógini.

Tvøroyrar kommuna, starvsfólkini á Tvøroyrar skjalasavni, form. fyri Tvøroyrar bygda- og sjóvinnusavni mæla frá at leggja Tvøroyrar skjalasavn undir bygdasavnslógina, og mæla heldur til at Tvøroyrar skjalasavn verður sjálvstøðugt skjalasavn við egnari játtan tilvísing til Tjóðsavnið.

Tilmælið hjá Kára Jespersen leiðari av Tvøroyrar skjalasavnið er, at skjalasavnið verður framhaldandi varðveitt sum sjálvstøðugt skjalasavn og ikki verður lagt undir bygdasavnið.

Kristin Michelsen greiddi frá, at sama tilmælið er frá TVK, sum hevur viðgjørt støðuna og heldur fast um, at skjalasavnið ikki verður lagt undir bygdasavnið. Kristin Michelsen greiddi frá, at landstýrið hevur avsett játtan á FÆ2022 við ynskið um, at Tvøroyrar skjalasavn framhaldandi verður skipa sum sjálvstøðugt skjalasavn. KM gjørdi vart við at TVK mælir staðiliga frá at skjalasavnið verður lagt undir bygdasavnið, sum hann skilur er ynskið/ætlanin hjá umsitingini í mentamálaráðnum.

Form. fyri Tvøroyrar bygda- og sjóvinnusavnið, Dan E. Thomsen greiddi frá, at bygdasavnið eisini hevur viðgjørt áheitanina um at leggja skjalasavnið saman við bygdasavninum, og verður hetta ikki viðmælt av nevndini í bygdasavninum. Sagt var, at bygdasavnið hevur ikki førleikar til skjalasavn, men er nógv upptikin av savnslutum. Nevndin metur seg ikki hava tíð til røkt av skjalasavni, sum sýnist vera sera tíðarkrevjandi.

Partarnir samdist um, at mæla landstýrismanninum í mentamálum til at leingja royndartíðina fyri Tvøroyrar skjalasavn, og at umsitingin í mentamálaráðnum dagførir lóggávuna fyri skjalasavninum og bygdasøvnum.

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um skjalasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 30. apríl 2018

- Løgtingslóg nr. 17 af 9. mai 1972 om bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi, sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndina og møguliga býráðnum til kunning/støðutakan.

**Mentanarnevndin 09. november 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 25. november 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**34/21**

**21/00657-2 Bókaútgáva um Kristian Djurhuus av Ola Jacobsen**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 09.11.2021 | 92/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 16/21 |
| 3 Býráðið | 25.11.2021 | 34/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 04.11.2021**
Umsitingin hevur móttikið teldupost frá Óla Jacobsen, sum gevur út bók um fyrv. Løgmann Kristian Djurhuus, har rithøvðurin spyr um Tvøroyrar kommuna hevur áhuga í at skipar fyri framløgu á Tvøroyri, har fólk og kommunan fáa møguleika at ogna sær bókina.

Sagt verður at Ein stórur partur av bókini er um Tvøroyri og Suðuroynna. Nógv av tí hevur ikki verið alment kent fyrr.

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2021, §5.24.14 Stuðul til ítróttar- og mentanarmál**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndina og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 09. november 2021:**
Einmælt samtykt at umsitingin vendur seg til Óla Jacobsen og bjóði honum Seglloftið til bókkaútgávu uttan kostnað.

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 25. november 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:20

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen